# Klaksvíkingar við á Fish Fair

**Aftur hesaferð verður Klaksvíkin umboðað á North Atlantic Fish Fair framsýningini í Runavík. Á hesum sinni verða tað fyritøkurnar, Com-Data, KBI, Contriv og Gael Force, sum saman við Klaksvíkar Kommunu og Norðoya Kunningarstovu, koma at búleikast á 70 fermetra básinum hjá klaksvíkingum**


*– Tað er neyðugt hjá fyritøkum í Norðoyggjum at vísa, hvat tær hava at bjóða, sigur ein av framsýnararnum, Karl Birgir Isaksen*

*Mynd: Solby A. Eliasen*

KLAKSVÍK OG HANDIL
*Rúna Sivertsen*

Tær 4 fyritøkurnar hava ein rúmligan bás, har tað, tær hava at sýna fram, veruliga kemur til sín rætt.

– Tað er umráðandi fyri fyritøkurnar her norðuri, at tær leita út um Klaksvíkina, tí er hetta eitt kærkomið tiltak, sigur Rani Nolsøe, menningarstjóri, sum er samskipari hjá klaksvíkingum.

Tað er reklamufyritøkan, Vasti, í Klaksvík, sum hevur designað básin, so hann kemur at síggja út sum ein heild, hóast tað eru fýra sera ymiskar fyritøkur, ið sýna fram saman.

– Básurin er bæði sjónligur og rúmligur, og tað verður spennandi at síggja, hvussu hann kemur at síggja út, sigur Rani Nolsøe.

Norðoya Kunningarstova, sum eisini er ætlað at vera andlitið hjá Klaksvíkini úteftir, verður við á framsýningini umboðandi Norðoyggjar.

## Nýggj fyritøka við

Nýggjasta fyritøkan á básinum hjá klaksvíkingum, er sølu- og tænastufyritøkan, KBI. Tað er Karl Birgir Isaksen, sum fyri góðum ári síðani stovandi fyritøkuna, sum nú hevur 3 fólk í arbeiði.

KBI leggur seg eftir at selja og veita tænastu til skip og bátar, virkir og fyritøkur.

Karl Birgir sigur, at tað altíð hevur verið hansara dreymur at fara undir egið virki. Tá hann í útvið 20 ár hevði savnað sær royndir innan handilsvinnuna, gjørdi hann av, at nú skuldi dreymurin gerast veruleiki.

Fyri nøkrum mánaðum síðani eydnaðist KBI at fáa einaumboð í Føroyum upp á Castrol Marine oljuúrdráttir.

– Hetta er avgjørt ein stórur fyrimunur hjá fyritøkuni, tí sølan av hesum úrdráttum verður heilt givið ein stórur partur av framtíðarvirkseminum hjá okkum, sigur hann.

Orsøkin, til at Karl Birgir gjørdi av at vera við á Fish Fair, er, at har verður møguleiki fáa samaband við potentiel viðskiftafólk kring oyggjarnar.

Við á básinum hjá KBI verður m.a. sølustjórin á høvuðsskrivstovuni hjá Castrol í Noregi.

– Vit gleða okkum at hitta nógv fólk á framsýningini til eitt hugnaligt prát um olju, sigur Karl Birgir Isaksen at enda í samrøðuni við Sosialin.

## Neyðugt at vísa andlit

Tey, sum sýna fram, siga, at tað er neyðugt hjá øllum fyritøkum í Norðoyggjum at vísa, hvat tær hava at bjóða av vørum og tænastum.

– Í løtuni stendur Klaksvíkin og Norðoyggjar á einum vegamóti, tí um stutta tíð, verður koyrandi á meginøkið. Tá er neyðugt at verða væl fyrireikað, so fólk aðrastaðni koma higar at keypa bæði vørur og tænastur frá okkum, siga tey.






# Plane Maintenance
## (Skipað viðlíkahald)
## – eitt amboð til økt lønsemi



Lønsemi er eitt lyklaorð innan allar vinnugreinar - eisini innan fiskivinnuna. Lønsemi fæst m.a. við at tryggja sær best møguligan prís fyri framleiðsluvøruna, við at hava eina munagóða framleiðslustýring og eina trygga kostnaðarstýring. Eitt amboð, sum kann verða viðvirkandi til økt lønsemi er Plane Maintenance.

Plane Maintenance gevur:
- Betri góðsku á bæði rakstri og fiskaríi hjá skipum og harvið eisini betri prís/úrtøku
- Øktan tryggleika
- Betri støðufesti hjá mannskapinum umborð
- Best møguligan prís við sølu av skipinum fyri eyga

Satpool Software hevur framleitt Plane Maintenance-skráir til fiskiskip og onnur skip í nógvum londum, eisini í Føroyum m.a. til Hviltenni, Brimil og Tjaldrið.

Trygd hevur ta áskoðan, at Plane Maintenance er eitt munadygt amboð, sum við stórum fyrimunum hevði kunnað verið nýtt umborð á nógvum fiskiskipum, og hava vit tí avtalað við projekt manager Bjørn Krogstad frá Satpool Software Solutions at halda ein fyrilestur um evnið.

Fyrilesturin verður hildin umborð á Norrönu **mikudagin 30. apríl 2003 kl. 11.00.**

Tú er vælkomin til fyrilesturin, soleiðis at tú fært at vita, hvussu tú kanst verða við til at økja um lønsemið í tínari fyritøku. Vitja eisini básin hjá Trygd og Føroya Banka á North Atlantic Fish Fair.

*TRYGD*




<ph_1>

<ph_1>




Bli med Fiskeribladet på fisketur langs Norskekysten. Les om storfangstene, teknologiske utviklinger og kanskje kan du til og med finne et rimelig fiskebruk på salg! For kun kr 400,- får du en ramsalt avis i postkassa to ganger i uka ut 2003.

ja! Jeg ønsker å abonnere på Fiskeribladet ut 2003 for kun kr 400,-

AVISEN SENDES TIL:

Navn:.................................... Tlf.:....................

Adresse:....................................

Postnr.:.................... Poststed:....................

Vi gir deg: + ÅRETS PRIS 750,- + Rykende ferske nyheter - uansett vær og vind! + Nyttige annonsesider for kjøp og salg! + Norges eldste kystnæringsavis!

*Send inn kupongen, eller ring vår abonnementsavdeling 77 05 90 00. Vær rask - få den første avisen om få dager!*

Tilbudet gjelder nye abonnenter

betaler porto

SVARSENDING
Avtale nr. 80 6000/17

9401 HARSTAD